– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Hugnalig eldri hús á Landavegnum í Tórshavn

**Frálíku húsini standa sera væl fyri á Landavegnum**









### Fyrsta fatanin

Fyrsta fatinum tá tú kemur til húsini, er at her er talan um eini sera hugnalig eldri hús.

### Húsini

Húsini eru nakað dagførd, væl hildin og í góðum standi, stílurin er ikki heilt nýmótans, men hevur tú hugflog og dámar at seta í stand eru hetta røttu húsini. Tú kanst eisini flyta inn í húsini uttan at gera nakað.

Húsini standa væl fyri í hugnaligum og friðarligum umhvørvi nær miðbýnum. Stutt er til barnagarðar, skúlar, stovnar, handlar og alt handa slag, ið liggur í mitt í býnum.

### Ljós og luft

Húsini standa væl fyri við høvuðsvegum. Har er veðurgott og tú hevur nakað av útsýni úr ovastu hædd.

### Urtagarður og umhvørvið

Húsini eru umgyrd av urtagarði við grasvølli, so tú kanst sita mitt í býnum og tó nýta sólina og friðin.

### Inrætting

Í miðhæddini er hjallur, inngongd, gongd, køkur, borðsstova, stova, millumgongd við niðurgongd til kjallara, baðirúm og hjúnarrúm. Í ovastu hædd er trappupallur / arbeiðsrúm, wc, 1 størri kamar og 2 smærri kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, 1 størri kamar, 2 smærri kømar og vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm.

### Fakta

**Adressa:** Landavegur 17, Tórshavn
**Byggiár:** 1923 / 1962
**Hæddir:** 3
**Gólvvídd:** 192 $m^2$ í 2 hæddum
**Grundøki:** 317 $m^2$
**Hjallur:** ja









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**